**Svein Rógvi Nielsen rør við Nevinum Reyða og situr á lærinum í stýriborð:**



## Sekundini tala fyri seg

Hóast Nevið Reyða var knapt tíggju sekund framman fyri nummar tvey, so var talan um ein harðan róður, sambært bátsformanninum.

- Tað var hart at rógva í dag, tí veðrið er so gott, og tað er so stilt. Starturin hjá okkum var ikki nakað serliga góður, men vit høvdu ein frálíkan miðróður, so har vunnu vit, staðfestir bátsformaðurin og leggur afturat, at manningin allatíðina var greið yvir, at teir vóru langt fremst.

Svein Rógvi er tó varin við at siga ov nógv, tá tosið fellur inn á føroyameistaraheitið.

- Tað eru tvær stevnur eftir enn. Okkurt óvanligt kann altíð henda, men eg vil siga tað soleiðis, at tá vit hava vunnið Vestanstevnuna, eru vit føroyameistarar, sigur Rógvi.

Í byrjanini av árinum var tað sera tætt millum Nevið Reyða og Kvívíking. Á norðoyastevnu var bert ein brotpartur av einum sekundi, sum skilti teir. Leygardagin vóru tað næstan tíggju sekund.

- Sekundini tala fyri seg. Vit hava betrað okkum nógv. Málið er at vinna alt, sum vinnast kann, staðfestir bátsformaðurin á Nevinum Reyða.

**- sae -**



# Ongin er sum Nevið

**Púra einsamallir komu teir á Nevinum Reyða rógvandi inn móti málinum. Næstan tíggju sekund aftan á fyrsta skotið, bleiv skotið fyri Kvívíkinginum, sum bleiv nummar tvey**

8 MANNAFØR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Nevið Reyða sló fast við tíggju tumma seymi leygardagin, at teir eru besta og mest upplagda boði upp á føroyameistaraheitið hjá 8 mannaførunum í ár. Fleiri bátslongdir framman fyri Kvívíking fóru teir fyrstir um málið, og frøin var stór.

Tað var annars ein sera javnur startur hjá øllum bátunum. Miðvingur og Knørrur duttu burtur ímillum beinanvegin, men restina av bátunum fylgdust væl fyrstu løtuna. Síðani løgdu tríggir bátar seg fremst, Ørvur, Argjabáturin og Nevið Reyða. Kvívíkingur var so nakað aftanfyri.

Nevið Reyða legði seg so á odda og økti um leiðsluna allan vegin á málið. Kappingin um annað og triðja plássið harðnaði so hvørt sum bátarnir nærkaðust málinum, men hvør vinnarin fór at verða, var ongantíð nakar ivi um. Úrslitið var, at Nevið Reyða vann, Kvívíkingur hevði ein góðan endaspurt og kom næstur á mál og eftir teimum kom so tann reyði Argjabáturin.

Føroyameistaraheitið hjá 8 mannaførunum verður óivað avgjørt á Vestanstevnu, og tað skal vilja øgiliga illa til, um ikki tað fer til Klaksvíkar.

**8 mannafør menn**

1 Nevið Reyða 07:13.19
2 Kvívíkingur 07:22.04
3 Ørvur 07:24.23
4 Argjabáturin 07:25.15
5 Árnfirðingur 07:37.04
6 Knørrur 07:45.09
7 Miðvingur 07:46.15

**Bergur Lützen rør við Gongurólvi og situr á toftini í bakborð:**



## Vórðu enn meira uppsettir

Hóast Gongurólvur fekk skaða, tá ein bátur rendi á seksmannafarið, eydnaðist tað monnunum at vinna teirra róður. Tá báturin eftir samanstoytin varð fingin upp á land, var greitt, at hann lak eitt sindur.

- Vit smurdu bátin inn í einar fimm ella seks pakkar av Vita margarini, og tað gekk. Vit vóru sera fjálturstungnir, meðan vit smurdu bátin inn. Men eg haldi, at skaðin gjørdi, at vit vórðu enn meira uppsettir til róðurin. Og stuðulin frá familjum og øðrum gjørdi eisini sítt, greiðir Bergur frá.

Vit fingu rímuliga skjótt at vita, at vit vóru fremstir, men á sjálvum málinum ivaðust vit kortini. Men tað var sera gott, tá so vinnaraboðini komu.

Hvat verður nú gjørt við Gongurólv?

- Eg veit ikki....vit fara helst at bíleggja ein platt av Vita, sigur Bergur við einum skeivum smíli.

**- sae -**

# Vita la Gongurólvur

**Innsmurdur í Vita margarin fór Gongurólvur fyrstur um málstrikuna á Skála leygardagin. Sigurin má sigast at vera eitt týdningarmikið stig fyri at nærkast føroyameistaraheitinum**

6 MANNAFØR MENN
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*




Kappingin hjá 6 mannaførunum við monnum stendur millum havnabátarnar báðar, Gongurólv og Jarnbard. Sølmundur úr Runavík hevur eisini hug at blanda seg, men leygardagin var størri munur á bátunum enn á Varmakeldu, tá alt fór um málið í einum hurlivasa, sum Jógvan Arge tók til.

Gongurólvur fekk bestu byrjanina og legði seg á odda beinanvegin. Honum á baki kom Jarnbardur, og síðani Sølmundur. Hesir tríggir bátarnir løgdu seg nærum í eitt felt fyri seg sjálvar og kappaðust har. Teir togaðust aftur og fram allir, men sama støða helt sær allan vegin. Gongurólvur fremstur, Jarnbardur næstur og Sølmundur sum tann triðji.

Eina løtu var kappingin millum Gongurólv og Jarnbard sera hørð. Teir fóru mest sum stavn um stavn eina løtu, men so kom ferð á Gongurólv aftur, og teir komu á mál umleið hálva bátslongd framman fyri Jarnbard, sum var knappa bátslongd framman fyri Sølmund.

**6 mannafør menn**

1 Gongurólvur 07:30.21 1G
2 Jarnbardur 07:31.23
3 Sølmundur 07:33.04
4 Sundabáturin 07:35.15
5 Hósvíkingur 07:38.14
6 Páll Fangi 07:43.07
7 Smyril 07:48.22
8 Stjørnan 07:50.10
9 Víkingur 07:50.12
10 Lómur 07:51.01
11 Fuglfirðingur 08:10.01